Landssjúkrahúsið



# Fólkaskúlanæmingar í starvsvenjing

# Starvsvenjing

Landssjúkrahúsið er nógv umbiðið í samband við, at 9. - og 10. floks næmingar úr fólkaskúlunum skulu í starvsvenjing. Vit taka upp til tveir næmingar hvørja ferð, og eru teir hjá okkum í tvær vikur.



Fyrsta dagin, har møtt verður í forhøllini kl. 9.00, verður tikið væl ímóti, og næmingurin fær útflýggjað eitt yvirlit, sum vísir, hvar hann skal verða og eitt kort, sum gevur atgongd til ókeypis kost á middegi.

Tað verður eisini greitt frá, hvat vit vænta av næminginum, at hann møtir upp til tíðina, og er væl upplagdur hvønn morgun. Eisini verður tosað um mannagongdir, so sum tagnarðarskyldu v.m. og um møguligar útbúgvingar innan heilsuverkið.

Starvsvenjingin er skipað soleiðis, at næmingurin kemur runt á teimum ymisku deildunum á sjúkrahúsinum. Ein vælskipað ætlan er fyri allar dagarnir, og eru ábyrgdarfólk á hvørjari deild, sum taka sær av næminginum.



## Fyrsti dagur tín



Fyrsta dagin skal tú møta í forhøllini kl. 9.00. Tað er Hjørdis í Liða, skrivari á Starvsfólkadeildini, sum tekur ímóti tær, og bjóðað verður morgunmat. Tosað verður um starvstíðina, útbúgvingarmøguleikar, tagnarskyldu, har undirskrivað verður viðvíkjandi tagnarskyldu, og útflýggjað verður eitt yvirlit yvir starvsdagarnar.

Ein til tveir dagar eru settir av til hvørja deild, har tú fært ein kontakpersón, sum tú skalt fylgjast við, so at tú ongantíð kemur at ganga einsamøll/mallur. Tað er Starvsfólkadeildin í samráð við deildirnar, sum ger av hvørjar deildir tú kemur á.

Kontaktpersónurin syrgir fyri búna til tín.

## Meðan tú ert her hjá okkum

Sum starvsnæmingur fært tú kunnleika til viðurskiftini og arbeiðið á Landssjúkrahúsinum. Tú fært loyvi til at luttaka í tí praktiska arbeiðinum, tá tað er gjørligt. Tó verða uppgávur, sum tú sum næmingur ikki kann verða við til.



## Tú hevur tagnarskyldu

Sum næmingur hevur tú tagnarskyldu um øll tey viðurskifti viðv. innlegging, sjúku og viðgerð hjá sjúklingunum. Tagnarskyldan er galdandi bæði innanfyri og uttanfyri sjúkrahúsið – eisini eftir starvstíðina.



## Royking

Alt Landssjúkrahúsið er roykfrítt.

## Reinføri

Eitt gott handreinføri er týdningarmiklasti hátturin at forða fyri smittu hjá starvsfólkinum. Gott handreinføri er fyrst og fremst reinar hendur og neglir, stuttar neglir uttan neglalakk og eingin armbond, armbandsur ella ringar.



Hendurnar skulu altíð vaskast:

- áðrenn og eftir sjúklingasamband
- eftir at hava verið á vesi
- eftir hosta, njósing og næsareinsing

## Peningur og prýðislutir

Landssjúkrahúsið hevur ikki ábyrgd av peningi ella prýðislutum tínum, meðan tú ert á sjúkrahúsinum. Lat tí stórar upphæddir og aðrar virðislutir verða heima við hús.

## Eftirmeting



Síðsta dagin verður eftirmett, og stuttligt er at hoyra frá teimum flestu, hvussu læruríkt starvstíðin hevur verið. Vit ynskja, at tú fært eina góða og lærurika starvstíð á Landssjúkrahúsinum.

## Samband

Um tú verður sjúk/ur í starvstíðini, verður tú biðin um at siga frá hjá Hjørdis í Liða á fart. 234684 /304682 ella á hjordis@ls.fo

Landssjúkrahúsið

www.ls.fo